# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo



***Skrásetingar nr.:***

**L-F157-1**


# Leiðbeining um ventilatión í hárfríðkanarstovum

### *Inngangur.*

Leiðbeiningin er tilevnað fyri starvsfólk og arbeiðsgevarar innan hárfríðkanaryrki, og viðgerð viðurskiftini viðvíkjandi inniluft í hárfríðkanarstovum og hvat gerast kann á hesum øki fyri at tryggja eitt heilsugott og trygt arbeiðsumhvørvi.

Leiðbeining er eisini gjørd við atliti til átakið, ið Arbeiðseftirlitið gjørdi um ársskiftið 1993/-94 á hárfríðkanarstovum kring landið.

Átakið staðfesti okkara illgruna um, at tað bert hendinga staðni var ventilatión, sum við nóg góðum úrsliti kundi beina burtur heilsuskaðilig evni, ið verða brúkt her, og sum kunna verða atvoldin til ovurviðkvæmi og ørkymlan av húð og andingarleiðini.

Leiðbeiningin er eisini í tráð við ta donsku leiðbeiningina, sum er gjørd í fullari semju millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum har.

### *Ventilatión.*

Fyri at tryggja starvsfólkunum í hesi starvsgrein eitt heilsugott arbeiðsumhvørvi, er neyðugt at fáa til vega punktútsúgving, har arbeitt verður við bleiking, liting og permanenting, so sleppast kann undan dálking av inniluftini av teimum mongu evnum, sum verða nýtt í hesum arbeiði.

Arbeiðseftirlitið metir, at ein luftnøgd uppá 100 $m^3$ um tíman fyri hvørja útsúgvingartrakt, er ein hóskandi nøgd at rokna við, tá slík útgerð skal gerast, og at høvuðsreglan má verða, at øll, sum samstundis arbeiða við bleiki-, litingar- og permanentevnum o. líkn., skulu hava høvi at nýta eina súgvitrakt.

Hetta kann í flestu førum nøktast við at seta upp eina útsúgvingartrakt á ein arm, ið kann snara, millum hvørjar tveir arbeiðsstólar, og ein líknandi arm millum hvørji tvey vaskipláss.


***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar frá 25. august 1983.

***Útgivið fyrstu ferð:*** **5. apríl 1994**

***Seinastu broytingar:*** **25. januar 1996**


Hendan útsúgvingartraktin kann møguliga eisini nýtast har evnini verða blandaði, ella eisini má

eitt blandiskáp við útsúgving setast upp fyri seg.

Ein slík punktútsúgving vil í flestu førum geva nóg mikið av ventilatión í sjálvum rúminum, soleiðis at eitt hóskandi luftskifti verður í allari stovuni.

***Uppfylging.***

Arbeiðseftirlitið vil við leiðbeining og kravboðum tryggja, at arbeiðsumhvørvi á hárfríðkanarstovum verður forsvarligt.

Hetta verður gjørt við eftirlitsvitjan, tá ein ávís tíð er gingin, soleiðis at hárfríðkanarstovurnar hava havt ta neyðugu tíð til at innrætta seg eftir teimum krøvum Arbeiðseftirlitið setur til slík arbeiðspláss.

Tað ber altíð til at seta seg í samband við Arbeiðseftirlitið, tá tað ræður um arbeiðsumhvørvi hjá starvsfólkum.

Leiðbeiningin fær gildi beinanvegin.

**Arbeiðseftirlitið**, 5. apríl 1994

Eli Davidsen, stjóri (sign.)